Skrá fyri vitjan hjá hennara hátign drotningini í Føroyum

tann 14.–19. juli 2021

## Hósdagur tann 15. juli í Havn

*Almenn móttøka í Havn*

Kl. 09.20

Danska vaktarskipið Hvidbjørnen og føroyska vaktarskipið Brimil sigla inn á Havnina saman við træskipum og róðrarbátum. Meðan siglt verður, spælir harmoniorkestrið GHM umborð á sluppini Westward Houndir leiðslu av Mariu Wang Reinert. Á Bursatanga spælir Havnar Hornorkestur undir leiðslu av Tróndi H. Olsen.

Kl. 09.45 Westward Ho og Brimil leggja at á Bursatanga.

Kl. 10.00 H. H. Drotningin kemur við bili.

Móttøka á bryggjuni:

Bárður á Steig Nielsen løgmaður og frú Rakul Nielsen
Lene Moyell Johansen ríkisumboð og hr. Stendor Johansen
Heðin Mortensen borgarstjóri og frú Hjørdis Mortensen

Gunnvá Fríða Bárðardóttir Nielsen handar H. H. Drotningini blómutyssi. Løgmaður heldur vælkomurøðu og rópar 9-falt hurrá fyri H. H. Drotningini. Síðan spælir Havnar Hornorkestur ”Kong Christian” og føroyska tjóðsangin ”Tú alfagra land mítt”. Ímeðan stendur sendinevndin still.

Eftir føroyska tjóðsangin fylgjast løgmaður og H. H. Drotningin yvir til løgtingsformannin. Løgmaður navnkennir føroysk og donsk embæti í hesum rað:

Jógvan á Lakjuni løgtingsformaður
Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri
Johnhard Klettheyggj løgtingsstjóri
Jógvan Fríðriksson biskupur
Michael Boolsen landfúti
Henrik Møller sorinskrivari
Bjarki Joensen flotakapteynur

Kl. 10.20 Farið verður við bili til stjórnarbygningarnar í Tinganesi.

*Móttøka í Tinganesi*

Kl. 10.30 Løgmaður er vertur fyri móttøku.

Løgmaður fylgist við H. H. Drotningini til Eysturstovu, har hann navnkennir landsstýrið í hesum rað:

Jørgen Niclasen landsstýrismaður í fíggjarmálum
Jacob Vestergaard landsstýrismaður í fiskivinnumálum
Jenis av Rana landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur landsstýriskvinna í almannamálum
Helgi Abrahamsen landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Løgmaður og løgtingsformaður handa H. H. Drotningini gávuna, ið skuldi verða handað H. H. Drotningini í sambandi við hennara 80 ára føðingardag.

Kl. 11.15 Farið verður við bili til Løgtingið.

Kl. 11.20 Komið verður til Løgtingið.

Margreta Simonsen handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Jógvan á Lakjuni løgtingsformaður navnkennir formansskap Løgtingsins og stjóran í hesum rað:

Johan Dahl, Sambandsflokkurin
Eyðgunn Samuelsen, Javnaðarflokkurin
Bjørt Samuelsen, Tjóðveldi
Johnhard Klettheyggj, løgtingsstjóri

Løgtingsformaðurin bjóðar vælkomin, og H. H. Drotningin fær høvi at heilsa upp á løgtingslimirnar, ið eru til staðar.

Kl. 12.05 Farið verður til gongu frá Løgtinginum oman í býartrappuna.

Heðin Mortensen borgarstjóri og frú Hjørdis Mortensen taka ímóti uttan fyri Løgtingið og spáka við H. H. Drotningini og løgmanni oman í býartrappuna.

*Almenn móttøka í Havn*

Kl. 12.10 Komið verður til býartrappuna.

Havnar Hornorkestur spælir. Frida Bogadóttir handar H. H. Drotningini blómutyssi. Borgarstjórin navnkennir býráðið í hesum rað:

Annfinn Brekkstein, 1. varaborgarstjóri
Annika Olsen, 2. varaborgarstjóri
Jákup Dam
Tróndur Sigurðsson
Gunvør Balle
Bjørg Dam
Ruth Vang
Birgir Nielsen
Kristianna Winther Poulsen
Kári Johansen

Súna Mørk
Elsa Berg
Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóri

Borgarstjórin heldur vælkomurøðu. Kamarkórið syngur, og Dánjal og Búi trína fram á pall.

Kl. 12.35 Komið verður til Hotel Hafnia.

Kl. 12.45 Borgarstjórin er vertur fyri miðmála.

Kl. 13.50 Farið verður við bili til Skúlan á Fløtum.

Kl. 14.00 Komið verður til Skúlan á Fløtum.

Orkestrið Ælabogin spælir, Annika Højgaard stjórnar. Mia Lisa Mortensen handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Forkvinnan í Trivnaðarnevnd býráðsins, Súna Mørk, og hr. Sámal Erik Hentze taka ímóti saman við Regini Marnersson og frú Marjun Dánialsdóttur umframt varaskúlastjóranum Martin Karl Olsen og frú Biritu Dalsgaard Olsen. Øll arbeiða á skúlanum. Rundvísing á skúlanum, og eftir tað fara næmingar á pall. Vitjanin endar við, at spákað verður á takinum á skúlanum, haðan útsýni er yvir Havnina.

Kl. 14.50 Farið verður við bili til Sjóvinnuhúsið.

Kl. 15.00 Komið verður til Sjóvinnuhúsið.

Forkvinnan í Vinnunevnd býráðsins, Kristianna Winther Poulsen, tekur ímóti saman við Sóleyð Hammer, stjóra í Hugskotinum.

Borgarstjórin fylgir H. H. Drotningini inn í auditoriið Kongshøll. Til staðar verða Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum, og Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum. Harumframt luttaka býráðið, nevndarlimir og leiðslan á Fróðskaparsetri Føroya, og Filmshúsið umframt onnur boðin.

Ólavur Ellefsen, nevndarformaður á Fróðskaparsetri Føroya, bjóðar vælkomin og greiðir frá húsinum. Eftir tað greiðir Jón Hammer, nevndarlimur í Filmshúsinum, frá føroyskari filmsframleiðslu. Víst verða brot úr nýggjastu og fyrstu føroyskt/danskt framleiddu krimirøðini ”Trom” og úr heimildarfilminum ”Heartist” um listakvinnuna Sigruna Gunnarsdóttur.

At enda handar listakvinnan Sigrun Gunnarsdóttir H. H. Drotningini gávu. Vitjanin endar við, at vokalbólkurin Sway syngur.

*Veitsludøgurði*

Kl. 19.00 Komið verður til Norðurlandahúsið.

Bárður á Steig Nielsen løgmaður og frú Rakul Nielsen taka ímóti H. H. Drotningini. Irena Louisa Duritudóttir handar H. H. Drotningini blómutyssi. Løgmaður navnkennir Gunn Hernes, stjóra í Norðurlandahúsinum, og fylgist við drotningini til konsertsalin. Konsert verður framman undan døgurðanum við føroyskum tónleikarum. Gestirnir sita í konsertsalinum.

Kl. 19.55 Løgmaður er vertur fyri døgurða.

Løgmaður fylgir drotningini til borðs, og gestirnir sessast. Undir døgurðanum halda løgmaður og drotningin hvør sína røðu. Sungin verður felagssangur.

## Fríggjadagur tann 16. juli í Svínoy og Fuglafirði

*Svínoy*

Kl. 10.20 Komið verður til tyrlupallin Yviri við Strond.

Kl. 10.30 Fráferð við tyrlu til Svínoyar.

K1. 11.00 Komið verður til Svínoyar.

Kl. 11.05 Farið verður við bili til minnisvarðan ”Dropin í lívsins havi”.

Kl. 11.10 Komið verður til minnisvarðan.

Edward Fuglø listamaður tekur ímóti og greiðir frá listaverkinum til minnis um tey 52 fólkini, sum hava mist lívið á sjónum ella í fuglabjørgunum hesi seinastu 300 árini. Aftaná fer Heri Joensen prestur at greiða frá Svínoy og navnaplátuni, sum stendur tætt við Dropan.

Kl. 11.30 Fráferð til gongu til Dansistovuna.

Kl. 11.35 Komið verður til Dansistovuna, har Edward Fuglø sýnir nøkur av verkum sínum fram, sum hann kallar ”Relikvium”. Søgur og hugtøk í Bíbliuni hava givið honum íblástur til verkini.

*Miðmáli*
Kl. 12.20 Borgarstjórin er vertur fyri óformligan miðmála.

Kl. 13.40 Fráferð við tyrlu til Fuglafjarðar.

*Fuglafjørður*

*Almenn móttøka*
Kl. 14.10 Komið verður til Miðstaðarlundina.

Dávur Juul borgarstjóri og frú Elsa Juul taka ímóti. Erla Sonnadóttir Tórgarð handar H. H. Drotningini blómutyssi. Borgarstjórin navnkennir býráðið í hesum rað:

Eyðun á Lakjuni, varaborgarstjóri
Sonni á Horni, 2. varaborgarstjóri
Gudny Vang
Ólavur Larsen
Edva Jacobsen
Magni Jøkladal
David Andreassen
Eivin Breiðaskarð

Fuglafjarðar Hornorkestur spælir, og Siloakórið syngur.

Borgarstjórin heldur vælkomurøðu.

Kl. 14.35 Komið verður til Ribarhús.

Odvør á Lakjuni, nevndarlimur í Heimavirkisfelagnum, tekur ímóti og bjóðar vælkomin.

Rundvísing í gamla pakkhúsinum og reiðarínum Ribarhúsi. Broderaðar pútur verða sýndar fram í fyrsta parti av húsinum. Kvinnur frá Heimavirkisfelagnum sita og brodera, binda o.s.fr. Í hinum partinum av húsinum tekur listamaðurin Heðin Kambsdal ímóti og sýnir nakrar av málningum sínum fram, har hann hevur málað H. H. Drotningina inn í myndevni síni. Rundvísingin endar við einari framsýning av gomlum kongabíblium heilt aftur til ár 1500. Petur Martin Petersen eigur bíbliurnar og sýnir tær fram.

Kl. 15.20 Komið verður til Framherja.

Anfinn Olsen stjóri og frú Elisabeth Eldevig taka ímóti. Tey greiða frá ídnaðarmenningini í bygdini við støði í gomlum myndum frá kongaligum vitjanum. Skipað verður fyri einum virkistiltaki, har dentur verður lagdur á at vísa á mat- og vitanarídnaðin í Fuglafirði innan fyri fiskavørur og fiskiveiði. Til staðar verða trý virki, sum greiða frá virksemi sínum og sýna fram ymsar vørur.

Virki, ið eru til staðar:
Havsbrún: Partur av Bakkafrost-samtakinum, ið framleiðir fiskaolju, mjøl og fiskafóður, Odd Eliasen stjóri
Framherji: Fiskivinnuvirki, sum veiðir ymisk sløg av fiski, Anfinn Olsen stjóri
Pelagos: Pelagiskt fiskivinnuvirki, CEO Jóhan Páll Joensen

At enda greiðir Osbjørn Jacobsen arkitektur frá Henning Larsen Arkitekter frá bygninginum.

Kl. 16.15 Komið verður til Fuglafjarðar skúla.

Skúlastjórin Jógvan Dahl tekur ímóti. Spákað verður inn í felagsøki skúlans, har skúlastjórin heldur røðu. Heidi Poulsen og Rúni Abrahamsen frá MAP Arkitektum greiða frá byggilistini. At enda vísir listamaðurin Edward Fuglø nýggja listaverk sítt til skúlan og býður H. H. Drotningini yvir til listaverkið.

Drotningin avdúkar nýggja listaverkið.

Vitjanin endar við, at næmingar koma á pall við kórsangi og sangi úr sangleikinum Lion King.

*Døgurði*

Kl. 18.55 Farið verður við bili frá Kongsskipinum Dannebrog til mentanarhúsið.

H. H. Drotningin við fylgi verður heintað av Lene Moyell Johansen ríkisumboð og hr. Stendor Johansen.

Kl. 19.00 Borgarstjórin er vertur fyri døgurða.

Dávur Juul borgarstjóri og frú Elsa Juul taka ímóti H. H. Drotningini. Undir døgurðanum heldur borgarstjórin røðu og handar H. H. Drotningini gávu. Tónleikarar koma á pall, og eisini verður felagssangur.

## Leygardag tann 17. juli í Vestmanna, Kvívík, Vatnsoyrum og Miðvági

*Almenn móttøka í Vestmanna*

Kl. 09.50

Borgarstjórin Pauli Trond Petersen tekur ímóti.

Arni Paulason Brattaberg og Silja Holm handa H. H. Drotningini blómutyssi.

Borgarstjórin navnkennir býráðið í hesum rað:

Bjørg á Rógvi, varaborgarstjóri
Sára Jógvansdóttir
Laila Haldansen
Anja Haldansen
Ingi Olsen

Borgarstjórin heldur vælkomurøðu. Vestmanna sangkór syngur tveir sangir.

Kl. 10.30 Komið verður til Heimið á Grønanesi.

Eir Elinardóttir handar H. H. Drotningini blómutyssi, og musikkskúlanæmingar spæla.

Borgarstjórin navnkennir stjóran fyri kommunala eldrasamstarvið Niels A. Joensen og eindarleiðaran Jóhonnu Mariu Pedersen, ”Miu”.

Mia greiðir frá ellisheiminum og navnkennir listakvinnuna Astrid Andreasen, sum greiðir frá listaverkinum Ársverkið, sum hongur í trappuuppgongdini.

Eftir tað hevur H. H. Drotningin høvi at heilsa upp á hini búfólkini á felagsøkinum, har musikkskúlanæmingar leika á ljóðføri. Vitjanin endar í felagsøkinum í høgra veingi, har sagt verður frá sjósvimjing, sum Maria á Heygum hevur íðkað alt sítt lív.

Kl. 11.30 Komið verður til Mýruverkið.

Hákun Djurhuus stjóri tekur ímóti saman við nevndarformanninum Kára Johansen og næstformanninum Haraldi S. Hammer.

Hákun Djurhuus stjóri greiðir frá SEV, sum fyllir 75 ár, grønu kósini fram til 2030 og nýggja pumpuverkinum á staðnum.

Kl. 12.00 Farið verður við bili til Fjørukrónna.

*Miðmáli*

Kl. 12.20 Borgarstjórin er vertur fyri miðmála.

Borgarstjórin tekur ímóti H. H. Drotningini. Borgarstjórin heldur røðu og handar H. H. Drotningini gávu. Listafólkini Jón Sonni Jensen og Silja Strøm navnkenna gávuna.

*Kvívík*

Kl. 13.40 Komið verður til Kvívíkar.

Uttan fyri kirkjuna taka Hans Jóhann Sørensen borgarstjóri og frú Signe Skaaning ímóti. Elinborg Skaaning Sørensen handar H. H. Drotningini blómutyssi. Borgarstjórin navnkennir bygdaráðið í hesum rað:

Frank Müller, varaborgarstjóri
Marjun Danielsen
Oluf Müller
Jóhanna Vang
Michael Shemesh
Nelly Haakonardóttir Debes

Dánjal Joensen, versonur ein av sjólátnu manningini, greiðir frá minnisvarðanum uttan fyri kirkjuna, ið minnist skipið Stella Argus, sum gekk burtur í 1957 við 22 monnum.

Kl.13.50 Fráferð til gongu til útgrevsturin Niðri á Toft.

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús fornfrøðingur tekur ímóti og greiðir frá útgrevstrinum, sum er fyrsti fornfrøðiligi útgrevstur í Føroyum. Útgrevsturin vísir húsatoftir frá víkingatíð. Súsanna Joensen konservatorur verður til staðar.

Kl. 14.20 Komið verður til vatnorkuverkið.

Borgarstjórin greiðir frá lítla vatnorkuverkinum, sum veitir barnagarðinum orku. Aftaná verður spákað inn í barnagarðin, har Ole Jakob Nielsen træsmiður og listamaður navnkennir gávuna frá kommununi til H. H. Drotningina. Býráðið verður hjástatt, tá ið gávan verður givin.

*Vatnsoyrar*

Kl. 15.20 Komið verður til Zarepta.

Bjarni Prior borgarstjóri og frú Heidi Prior taka ímóti. Amanda Prior Braga handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Borgarstjórin navnkennir býráðið og stjóran í kommununi í hesum rað:

Albert Ellefsen varaborgarstjóri
Jóanis Albert Nielsen
Rósa Samuelsen
Dagbjørn Hansen
Tórdis Eleina Dam Johannesen
Sólfríð Fjallsbak
Herborg Heidiardóttir Gaardlykke
Ásla Leila B. Johansen
Jónhard Selfoss
Jóhan Hendrik Ellefsen kommunustjóri

Borgarstjórin navnkennir síðan borgarstjóran í grannakommununi Sørvágs kommunu, Eyð Ellingsgaard.

Spákað verður niðan gjøgnum garðin, har borgarstjórin navnkennir leiðsluna í Zarepta, Jákup N. Olsen og frú Dorrit Olsen.

Kiara av Rana, langabbabarn Brynleif Hansen, handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Uttanfyri heldur Jákup N. Olsen røðu, og síðan syngur barnakór, sum John Færø stjórnar. Innanfyri í matarhøllini verður sagt frá søguni og virkseminum í Zarepta. Skipað er fyri samrøðu við børn, sum siga frá upplivingum sínum í Zarepta, og við Elsu Djurhuus, einkjuna eftir Brynleif Hansen. Saman stovnaðu tey Zarepta. Vitjanin endar við rundvísing, og H. H. Drotningin fær sum gávu eina tekning frá Heina Mørkøre, sum er gjørd í Zarepta í summar.

*Døgurði*

Kl. 19.00 Borgarstjórin er vertur fyri døgurða.

Bjarni Prior borgarstjóri og frú Heidi Prior taka ímóti H. H. Drotningini. Kvinnukórið Fljóðljóð syngur uttanfyri, tá ið komið verður. Borgarstjórin navnkennir Marit Jóhansdóttir, ið eigur hotellið, og bróðurin Napoleon Magnussen. Undir døgurðanum heldur borgarstjórin røðu og handar H. H. Drotningini gávu. Har verður tónleikaligt undirhald.

Kl. 21.15 Døgurðin endar

## Sunnudagur tann 18. juli á Toftum, Nesi og Strondum

Kl. 09.55 Komið verður til Fríðrikskirkjuna.

Við kirkjuna tekur Jógvan Fríðriksson biskupur ímóti.

*Gudstænasta*

Kl. 10.00 Gudstænasta.

Fyri fráferð navnkennir biskupur Súna í Hjøllum borgarstjóra.

Kl. 11.20 Komið verður til Undirhúsið.

Róar Trúgvason í Hjøllum handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Borgarstjórin navnkennir hjúnafelaga sín frú Engilbjørg Engelbrethsdóttur og bygdaráðið við hjúnafeløgum í hesum rað:

Heini S. Kristiansen varaborgarstjóri og frú Súsanna Kass Kristiansen
Høgni Hansen og frú Ann Gaardbo Hansen
Elin á Torkilsheyggi og hr. Leivur á Torkilsheyggi
Jan Højgaard og frú May í Túni Højgaard
Petur Jákup (Dakko) Petersen og frú Jórun Petersen
Rannvá í Túni Petersen og hr. Jan Petersen

Borgarstjórin navnkennir formannin í Undirhúsinum, Haldor Gaardbo, sum síðan navnkennir nevndina í Undirhúsinum í hesum rað:

Jákup Gøte, næstformaður
Alfred Olsen, skrivari
Poul Menning Petersen, tiltakslimur

Uttanfyri syngur kórið í Undirhúsinum. Aftaná fylgir formaðurin Haldor Gaardbo H. H. Drotningini inn.

Innanfyri sigur Alfred Olsen, nevndarlimur og fyrrverandi løgtingslimur, frá. Nevndin í Undirhúsinum er hjástødd. Í dagsins tilevni eru settar fram myndir frá vitjanini hjá Fríðriki kongi og Ingrid drotning á Toftum í 1949. H. H. Drotningin fær handað tvær gávur. Eina frá kommununi og eina frá Undirhúsinum.

Vitjanin endar við, at kórið syngur ein síðsta sang. Eftir tað handar næstelsti maður í Undirhúsinum, Mejnhardt Hansen, H. H. Drotningini blómutyssi. At enda verður felagssangurin ”Eitt troystarorð” sungin.

*Miðmáli*

Kl. 12.20 Biskupur er vertur fyri miðmála.

Jógvan Fríðriksson biskupur og frú Maria Eiriksdóttir taka ímóti.
Undir miðmálanum heldur biskupur røðu.

Kl. 13.40 Komið verður til rundkoyringina í tunlinum.

Bergur Poulsen, nevndarformaður, og stjórin í tunnilsfelagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar Teitur Samuelsen taka ímóti. Teitur Samuelsen greiðir frá tunlinum og navnkennir síðan listamannin Trónd Patursson, sum hevur gjørt installatiónina í tunlinum. Tróndur Patursson sigur frá listaverkinum.

*Strendur*

*Almenn móttøka*

Kl. 14.15 Komið verður til kirkjuna.

Artur Johansen borgarstjóri og frú Marjun Johansen taka ímóti. Nes Sóknar Musikkfelag spælir.

Alisa Fagradal Johansen handar H. H. Drotningini blómutyssi. Borgarstjórin navnkennir bygdaráðið í hesum rað:

Jóannes E. Markná, varaborgarstjóri
Súni F. Olsen
Rógvi R. Djurhuus
Hans Anders Jacobsen
Steingrímur Jacobsen

Borgarstjórin heldur eina vælkomurøðu og fylgist síðan við H. H. Drotningini inn í kirkjuna, har Kári í Garði, limur í kirkjuráðnum, greiðir frá kirkjuni. Kvinnukórið Silvitni syngur.

Aftaná verður boðið til kaffi í samkomuhúsinum hjá kirkjuni.

Kl. 15.10 Komið verður til Snælduna.

Borgarstjórin navnkennir Johan Carl Olsen, “Kalla” og frú Miu Olsen, ið eiga virkið. Maja Skaale Olsen, sum er gift inn í ættina, vísir runt og greiðir frá familjufyritøkuni.

Í handlinum hjá Snælduni handar borgarstjórin H. H. Drotningini gávu frá kommununi.

**Mánadag tann 19. juli í Havn**

Kl. 10.30 Tíðindafundur